

Hans Andrias Kelduberg, stjóri, her umborð á Thor Magni, umringaður av fleiri av litføgru myndunum hjá Inga Sørensen, sum nú skulu prýða skipið. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Listin hjá Inga Sørensen prýðir Thor-skip á heimshøvunum

**Jan Müller**

03.03.2015 - 21:01

Oljan.fo

Nú Føroyar í hesum árinum verða fýra spildurnýggj frálandsskip ríkari, hevur leiðslan í reiðaríinum Thor valt at prýða øll skipini við myndum, sum Ingi Sørensen hevur tikið av lívinum á havbotninum inni á føroyskum firðum. Og longu tá fyrsta av skipunum, Thor Magni, varð navngivið í Turkalandi herfyri, komu tær fyrstu litføgru myndirnar umborð.

Hans Andrias Kelduberg, stjóri í Thor, sigur, at teir hava valt at prýða øll 4 skipini við myndum hjá Inga Sørensen. Myndirnar eru eisini í sera hóskandi støðd, so tær síggjast. Og her greiðir Hans Andrias frá søguni um, hví hann valdi at prýða nýggju skipini við júst hesum myndunum:

“Sjálvur var eg saman við børnunum til myndaframsýningina í Norðurlandahúsinum hjá Inga Sørensen í fjør. Myndinar vóru fantastiska vakrar og eisini viðkomandi. Vit í Føroyum hava livað av tí, sum kemur úr havinum í fleiri ættarlið, og var tað sera hugaligt at síggja, hvussu ótrúliga vakrar og dragandi myndirnar vóru. Thor keypir ofta bøkur frá bókaútgevarum, og bókin hjá Inga Sørensen er einki undantak. Tað er stuttligt at geva slíkar bøkur við myndum av okkara serstakliga reina umhvørvi. Her síggja útlendingar, sum keypa fisk úr Føroyum, í myndum, hvaðani fiskur teirra stavar. Og eisini fyri havkaving, sum er eitt stórt ferðavinnumál, eru hesar myndir góð reklama.”

Hans Andrias sigur víðari, at tey hildu, at tað kundi vera hugaligt at keypa myndir frá Inga at hanga upp umborð á teirra skipum, sum eitt slag av reklamu fyri føroyskan fisk og ferðavinnu. Og sjálvandi er arbeiðið hjá seismikkskipunum at kortleggja tað, sum er undir botninum, og tí er stuttligt at kunna vísa fram myndir av havbotninum sjálvum, soleiðis at seismikkfólk, sum eru ferðandi við nýggju Thor-skipunum, kunna síggja hesar vøkru myndirnar.

“Eisini manningin er sera glað fyri hesar myndirnar. Tað er líkasum, at tær skapa ró umborð, ein livur seg ordiliga inn í myndirnar. Tær eru einki minni enn ótrúligar. Allir okkara sjómenn hava nokk verið við fiskiskipum. Og teir hava nokk eisini allir spælt niðri við sjóvarmálan og kenna seg tí eitt sindur aftur í myndunum.

Og stjórin og reiðarin er bæði nøgdur og fegin um úrslitið, nú myndirnar hava fingið fast innivist umborð á tí fyrsta skipinum.

“Einki er at ivast í, at hetta var rætta valið, og var tað ein góð íløga hjá okkum at keypa hesar myndirnar frá Inga Sørensen. Og harnæst er hettar sjálvandi eisini góð reklama fyri Inga , tí umborð á okkara skip koma nógv fólk úr ymsum londum. Okkara skip hava arbeitt í heili 70 londum eftirhondini.”











